Eik

Uppskot um broyttar

# Viðtøkur fyri Eik Banka P/F

www.eik.fo

# Viðtøkur fyri Eik Banka P/F

## Navn, heimstaður og endamál

**§ 1** Navn felagsins er Eik Banki P/F og hjánøvn felagsins Eikibanki P/F, Eik Bank P/F, Eik Bank International P/F og Føroya Sparikassi P/F.

**Stk. 2** Heimstaður felagsins er Tórshavnar kommuna.

**Stk. 3** Endamál felagsins er at reka peningastovnsvirksemi og annað virksemi, ið lóg um fíggjarvirksemi (lov om finansiel virksomhed) heimilar.

## Partapeningur og partabrøv

**§ 2** Partapeningur felagsins er kr. 812.927.400,00 lutaður sundur í 8.129.274 partabrøv á kr. 100,00. Nevndin er tó heimilað at luta partabrøvini sundur í partabrøv á kr. 1,00 ella margfald av hesum.

Partapeningurin er allur inngoldin.

**Stk. 2** Partabrøvini skulu ljóða upp á navn og verða skrivað inn í partabrævabók felagsins.

Nevndin kann taka avgerð um at skráseta partabrøvini í Værdipapircentralen ella øðrum tilsvarandi stovni.

Nevndin kann taka avgerð um at notera partabrøvini á einum virðisbrævamarknaði, herundir eisini á einum løggildum marknaði, í Føroyum ella uttanlands.

**Stk. 3** Partabrøvini kunnu ikki verða avhend til handhava. Partabrøvini eru umfaraskjøl.

**Stk. 4** Tann, ið ognar sær partabræv, kann ikki útinna tey rættindi sum partaeigari hevur uttan so, at viðkomandi er skrásettur í partabrævabókini ella hevur fráboðað og prógvað síni rættindi til partabrøvini. Hetta er tó ikki galdandi fyri vinningsbýti, aðrar útgjaldingar og rættin til nýggj partabrøv við hækking av partapeninginum.

**Stk. 5** Partabrøvini kunnu frítt verða avhend innan ásetingarnar í § 4, stk. 1 og 2.

**Stk. 6** Eingin partaeigari hevur skyldu at lata partabrøv síni innloysa fult ella lutvíst, samanber tó § 4, stk. 3 og 4.

**§ 3** Nevndini er heimilað, í tíðarskeiðnum fram til 1. oktober 2012, at hækka partapeningin í einum ella fleiri umførum við samanlagt áljóðandi kr. 200.000.000. Heimildin kann heilt ella lutvíst fremjast við at taka upp lán móti lánsbrøvum ella øðrum skuldarbrøvum við rætti fyri lánsveitara at umbýta lánið við partabrøv (umbýtilig lánsbrøv)

Partaeigarar felagsins hava framíhjárætt at tekna, uttan so at hækkingin:

a. fer fram í fríari tekning til marknaðarkurs,
b. verður framd í sambandi við umlegging av skuld, til partabrøv, ella
c. verður nýtt sum viðurlag fyri yvirtøku ella partvísa yvirtøku felagsins av øðrum fyritøkum ella ávísum ognarvirðum, til eitt virði, ið mótsvarar virðinum á teimum útgivnu partabrøvunum.

**Stk. 2** Nevndini er harumframt heimilað, í sama tíðarskeiði sum í stk. 1, at hækka partapeningin í einum ella fleiri umførum, við samanlagt áljóðandi kr. 10.000.000 at bjóða út millum starvsfólk og stjórnarlimir í felagnum og/ella tess dótturfeløgum, til ein av nevndini ásettan kurs. Heimildin kann heilt ella lutvíst fremjast við at taka upp lán móti lánsbrøvum ella øðrum skuldarbrøvum við rætti fyri lánsveitara at umbýta lánið við partabrøv (umbýtilig lánsbrøv).

**Stk. 3** Teir nýggju partaeigararnir skulu við komandi hækkingum av partapeninginum hava sama framíhjárætt at tekna sum verandi partaeigarar.

**Stk. 4** Partabrøvini skulu vera umfaraskjøl, ljóða uppá navn og geva rætt til vinningsbýti og onnur rættindi at galda frá tí degi, sum nevndin avger, tó í seinasta lagi frá roknskaparársbyrjan, árið eftir, at samtykt er at hækka partapeningin.

**Stk. 5** Tey nýggju partabrøvini skulu aðramáta vera á jøvnum føti við eldru partabrøvini.

**Stk. 6** Nevndini er heimilað at gera tær í sambandi við hækkingina av partapeninginum neyðugu broytingar í viðtøkunum.

## Ognaravmarking

**§ 4** Eingin partaeigari kann eiga meira enn 10 prosent av partabrøvum felagsins.

Henda avmarking er tó ikki galdandi fyri:
a. Eik Grunnin.
b. Eitt holdingfelag, verður slíkt stovnað sum liður í einari broyting av fíggjarliga virksemi felagsins.
c. Semju við Fíggjareftirlitið, um framda umskipan av felagnum eftir miss av partapeningi.

**Stk. 2** Partabrøv verða, hvat viðvíkur stk. 1 og § 6, stk. 5 og 6, mett sum hoyrandi einum partaeigara til, um so er, at tað millum eigararnar er eitt sovorðið serligt samband, at útinnanin av atkvøðurættinum til partabrøvini, má metast at vera avgjørd av sama áhugabólki, heruppií føri, har eigararnir gjøgnum partabrævaogn ella á annan hátt eru knýttir at eini felags konsern ella øðrum áhugafelagsskapi.

Í ivamálum tekur nevndin avgerð. Avgerðin kann kærast til aðalfundin.

**Stk. 3** Um farið verður upp um ásetingarnar í stk. 1, hevur partaeigarin skyldu til, innan 4 vikur eftir at ákrav er sett fram um tað, at avhenda tann partin, ið er omanfyri markið. Um partaeigarin ikki ger eftir ákravinum, áðrenn freistin er farin, hevur felagið rætt at innloysa partin omanfyri markið til áljóðandi virði ella til tann til hvørja tíð noteraða kurs, um kursvirðið er lægri enn áljóðandi virðið.

**Stk. 4** Er talan um eina støðu, ið er fevnd av stk. 2, og eigararnir ikki semjast um, hvørs partabrøv skulu innloysast eftir stk. 3, hevur felagið rætt til at innloysa partin omanfyri markið við teimum seinast ognaðu partabrøvunum.

## Umboðsdømi

**§ 5**
Virkisøki felagsins er býtt í hesi 7 umboðsdømi:
- Suðurstreymoy saman við Nólsoy, Hesti og Koltri
- Norðstreymoy
- Eysturoy
- Norðoyggjar, fevnandi um Borðoy, saman við Kalsoy, Kunoy, Viðoy, Svínoy og Fugloy
- Suðuroy
- Sandoy saman við Skúvoy og Dímun og
- Vágoy saman við Mykinesi

**Stk. 2** Partaeigarar felagsins verða skrásettir hoyrandi til eitt av omanfyristandandi umboðsdømum eftir egnum ynski. Ein partaeigari kann bert vera skrásettur í einum umboðsdømi, men kann skrivliga seta fram áheitan um í staðin at verða skrásettur í einum øðrum umboðsdømi.

Broytingin verður framd innan ein mánað frá tí, at felagið hevur móttikið eina tílíka skrivliga áheitan.

**Stk. 3** Setir partaeigari ikki fram ynski um skráseting í ávísum umboðsdømi, verður viðkomandi skrásettur hoyrandi til umboðsdømið, ið hann sambært tí, til hvørja tíð í partabrævabók felagsins, skrásetta bústaði er heimahoyrandi í.

Er talan um felag, felagsskap ella annan løgfrøðiligan persón, ið ikki skrivliga hevur sett fram ynski um skráseting í ávísum umboðsdømi, er bústaðurin, har høvuðsskrivstovan heldur til.

Er talan um partaeigara, ið hevur bústað uttanfyri umboðsdømini, og sum ikki skrivliga hevur sett fram ynski um skráseting í ávísum umboðsdømi, verða partabrøvini hjá viðkomandi roknað sum hoyrandi umboðsdømunum til í sama lutfalli, sum umboðsdømini tann 1. januar í árinum hava partabrøv skrásett í partabrævabók felagsins.

## Umboðsráð

**§ 6** Umboðsráðið hevur til uppgávu at virka til frama fyri virksemið hjá felagnum og sum sendiumboð at útinna atkvøðurættin hjá partaeigarunum á aðalfundum felagsins.

**Stk. 2** Val til umboðsráðið verður, undir eftirliti av aðalfundarvaldu grannskoðanini, fyriskipað av einum av nevndini tilnevndum valstýri, mannað við trimum limum, og verður hildið á partaeigarafundum í hvørjum av umboðsdømunum fjórða hvørt ár í januar ársfjórðinginum, sambært teimum sum skjal 1 viðfestu valreglum, ið aðalfundurin samtykkir, og Fíggjareftirlitið góðkennir.

**Stk. 3** Atkvøðurætt til umboðsráðið hava teir partaeigarar, hvørs partabrøv eru skrásett, áljóðandi navn, í partabrævabók felagsins tann 1. januar sama ár, ella sum hava fráboðað og prógvað síni rættindi til partabrøvini, tann 1. januar sama ár. Atkvøðurætturin til partabrøv hjá ómyndigum verður útintur av verjanum.

Teir partaeigarar, sum gera rætt sín galdandi sbrt. stk. 6, hava ikki atkvøðurætt.

**Stk. 4** Partaeigarar, ið hava atkvøðurætt sbrt. stk. 3, velja í tí umboðsdømi, har teir sbrt. § 5 eru skrásettir tann dagin, ið atgongdarkortið til partaeigarafundin verður heintað, limir í umboðsráðið soleiðis: í Suðurstreymoy 15 limir, í Eysturoy 10 limir og í Norðoyggjum, Norðstreymoy, Suðuroy, Sandoy og Vágoy 6 umboðsráðslimir fyri hvørt umboðsdømi; samanlagt 55 limir, ið verða valdir fyri 4 ár í senn, við gildi frá 1. apríl sama ár.

**Stk. 5** Hvørt partabræv gevur eina atkvøðu til umboðsráðsvalið, tó hevur hvør partaeigari í mesta lagi atkvøður svarandi til 5,0 prosent av samlaðu partabrøvunum.

Samlaða atkvøðutalið til umboðsráðsvalið verður roknað eftir samlaðu partabrøvunum pr. 1. januar sama ár.

**Stk. 6** Partaeigari, ella partaeigarar, sum eigur í minsta lagi 40.000 partabrøv, herundir Eik Grunnurin ella eitt møguligt holdingfelag, sum nevnt í § 4, stk. 1, hava rætt at tilnevna ein umboðsráðslim, fyri eitt ár í senn.

Partaeigari ella partaeigarar, sum aftaná 1. januar 2012 hava gjørt sín atkvøðurætt sambært stk. 3. galdandi, kunnu ikki í sama valskeiði gera rætt sín sambært hesum stk. galdandi.

Ognarkravið skal vera lokið hvønn 1. januar og hartil eisini tann dagin, ið atgongdarkortið til aðalfundin verður heintað, samanber § 10, stk. 7.

Hvønn 1. januar, í síðsta lagi, skulu hesir partaeigarar fráboða felagnum nøvnini á teimum tilnevndu umboðsráðslimunum, ið verða tilnevndir fyri 1 ár í senn.

Umboðsráðslimir, tilnevndir fyri hesar partaeigarar, nýtast ikki sjálvir at vera partaeigarar, men skulu vera persónliga myndigir og annars lúka treytirnar í § 7, stk. 2 - 4.

**Stk. 7** Umboðsráðslimir valdir sbrt. §6, stk. 4, fáa, fyri luttøku á umboðsráðsfundum og aðalfundum, samsýning samsvarandi reglum, ið eru galdandi fyri fundarvirksemi innan tað almenna, ella eftir líknandi skipan, ið nevndin ásetur.

## Valbæri til umboðsráðið

**§ 7** Valbæri til umboðsráðið hava persónliga myndigir partaeigarar, hvørs partabrøv eru skrásett, áljóðandi navn, í partabrævabók felagsins tann 1. januar sama ár, ella sum hava fráboðað og prógvað síni rættindi til partabrøvini, í seinasta lagi tann 1. januar sama ár.

**Stk. 2** Eingin, sum hevur álitisstarv ella starv í øðrum peningastovni, dóttur- ella móðurfelagi hjá sama, ella í øðrum feløgum, ið reka virksemi, sum er í kapping við felagið, kann vera limur í umboðsráðnum, uttan at nevndin gevur skrivligt samtykki.

Veitt samtykki kann í serligum førum, sum nevndin metir um, takast aftur.

**Stk. 3** Heldur ikki kunnu stjórar ella starvsfólk, ið starvast hjá felagnum, tess móðurfelagi ella dótturfeløgum, vera limir í umboðsráðnum.

**Stk. 4** Avhendir umboðsráðslimur, valdur eftir § 6 stk. 4 øll partabrøv síni, eru treytirnar fyri tilnevning eftir § 6 stk. 6 ikki longur til staðar, ella lýkur limur ikki longur treytirnar í § 7 stk. 2 ella 3, fer viðkomandi umboðsráðslimur úr umboðsráðnum.

## Sendiumboð

**§ 8** Umboðsráðslimir eru sendiumboð til aðalfundin.

## Leiðsla felagsins (nevnd og stjórn)

**§ 9** Felagið verður stýrt av einum aðalfundi, nevnd og stjórn.

## Aðalfundurin

**§ 10** Aðalfundurin, ið verður umboðaður av sendiumboðunum, er hægsti myndugleiki felagsins.

**Stk. 2** Partaeigararnir útinna sín atkvøðurætt gjøgnum sendiumboðini, samanber § 8.

**Stk. 3** Aðalfundurin verður hildin í Tórshavn eftir avgerð nevndarinnar.

**Stk. 4** Nevndin boðar til aðalfundar við kunngerð í einum ella fleiri av teimum føroysku bløðunum og skrivliga til øll sendiumboðini og teir í partabrævabókini skrásettu partaeigararnar, sum hava biðið um tað.

**Stk. 5** Fundarboðini, ið skulu innihalda fundarskrá fyri aðalfundin, skulu gevast í fyrsta lagi 4 vikur og í seinasta lagi 14 dagar fyri aðalfundin.

Um uppskot skulu viðgerast, ið krevja kvalifiseraðan meiri-

luta fyri at verða samtykt, skal hetta vera tilskilað ásýniligt í fundarboðunum.

**Stk. 6** Ein og hvør partaeigari hevur, við at sýna atgongdarkort atgongd til at møta á aðalfundinum – annaðhvørt persónliga ella umboðaður av fulltrúa – og hevur rætt at taka orðið á fundinum, men ikki at atkvøða.

Partaeigarin kann, tá hann møtir persónliga, møta við ráðgeva.

**Stk. 7** Atgongdarkort verða útflýggjað á skrivstovu felagsins ella á øðrum staði, ásett í fundarboðunum, teimum partaeigarum, sum í seinasta lagi 5 dagar fyri aðalfundin hava biðið um hetta.

**Stk. 8** Í seinasta lagi 8 dagar undan hvørjum aðalfundi skulu til skjals á høvuðsskrivstovu felagsins liggja frammi, til partaeigarar og umboðsráðslimir, fundarskrá og fullfíggjað uppskot, ið ætlandi skulu leggjast fram á aðalfundinum og, hvat tí vanliga aðalfundinum viðvíkur, eisini ársroknskapur við grannskoðaraátekning og ársfrágreiðing.

**Stk. 9** Fjølmiðlar hava atgongd til aðalfundin.

**§ 11** Ársaðalfundur verður hildin, innan apríl mánaður er farin.

**Stk. 2** Dagsskráin fyri ársaðalfundin skal fevna um:
1. Frágreiðing frá nevndini um virki felagsins í farna ári
2. Framløga av grannskoðaðum roknskapi til góðkenningar
3. Avgerð um nýtslu av yvirskoti ella rindan av halli sambært góðkenda roknskapinum
4. Heimila nevnd at lata felagið ognast egin partabrøv í tíðini fram til næsta ársaðalfund
5. Val av nevndarlimum
6. Val av grannskoðara
7. Uppskot frá nevnd, sendiumboðum ella partaeigarum, um nakað er
8. Ymiskt

**Stk. 3** Skal uppskot frá partaeigara, val av nevndarlimum undantikið, koma til viðgerðar á ársaðalfundi, skal tað latast nevndini skrivliga í seinasta lagi 1. februar, áðrenn aðalfundurin verður hildin.

**§ 12** Boðast skal til eykaaðalfundar eftir avgerð av aðalfundinum, nevndini ella einum grannskoðara, ella til viðgerðar av einum ávísum tilskilaðum evni eftir kravi frá partaeigarum, ið eiga í minsta lagi 1/10 av partapeninginum, ella 1/4 av partapeninginum, ið er ogn hjá øðrum partaeigarum enn Eik Grunninum. Boðast skal til eykaaðalfundar innan 14 dagar eftir, at krav er sett fram um tað.

**§ 13** Aðalfundurin verður stjórnaður av einum av nevndini tilnevndum fundarstjóra, ið tekur avgerð í øllum spurningum viðvíkjandi málsviðgerð og atkvøðugreiðslu, herundir eisini møguligum spurningum í sambandi við § 4, stk. 2.

**Stk. 2** Um tað, sum fer fram á aðalfundinum, verður førd gerðabók, ið fundarstjórin skrivar undir.

**§ 14** Sendiumboðini úr hvørjum umboðsdømi, sum eru limir í umboðsráðnum og eru vald eftir § 6, stk. 4, umboða hvør í sær ávikavist 1/15 í Suðurstreymoyar umboðsdømi, 1/10 í Eysturoyar umboðsdømi og 1/6 í hinum av umboðsdømunum, av partabrøvunum, sum tann 1. januar í árinum eru skrásett í partabrævabók felagsins, sum heimahoyrandi í umboðsdøminum, har viðkomandi er valdur, íroknað tey partabrøv, ið hoyra partaeigarum til, ið hava bústað uttanfyri umboðsdømini, og sum ikki skrivliga hava sett fram ynski um skráseting í ávísum umboðsdømi, jb. §5 stk. 3, men frásæð teimum partabrøvum heimahoyrandi í umboðsdøminum, ið eru umboðaði eftir stk. 2.

**Stk. 2** Hvørt sendiumboð, sum er limur í umboðsráðnum og er tilnevnt eftir § 6 stk. 6, umboðar tey partabrøv, sum tann 1. januar í árinum eru skrásett í partabrævabók felagsins sum ogn tilnevnandi partaeigarans, uppgjørd í samsvari við § 4, stk. 2.

**Stk. 3** Við undantaki av partabrøvunum, ið Eik Grunnurin ella eitt møguligt holdingfelag, nevnt í § 4, stk. 1, eigur, telja partabrøv, ið fara upp um 10 prosent av partabrøvum felagsins, sbr. § 4, stk. 1, ikki við, tá atkvøðugevandi partabrøvini verða uppgjørd í stk. 1, 2 og 7.

**Stk. 4** Á aðalfundinum hevur hvørt umboðsdømi eina atkvøðu fyri hvørt partabræv, uppgjørt eftir stk. 1.

Hvørt av sendiumboðunum úr umboðsdøminum, vald eftir § 6, stk. 4, umboðar, avrundað niður til nærmasta heila tal, ávikavist 1/15 í Suðurstreymoyar umboðsdømi, 1/10 í Eysturoyar umboðsdømi og 1/6 í hinum av umboðsdømunum av teimum soleiðis uppgjørdu atkvøðunum, í avvarðandi umboðsdømi.

Er umboðsráðslimur, valdur eftir § 6, stk. 4, farin frá í ótíð, sama hvør orsøkin er, verða atkvøðurnar í umboðsdøminum býttar javnt, avrundað niður til nærmasta heila

tal, millum eftirverandi umboðsráðslimirnar í avvarðandi umboðsdømi.

**Stk. 5** Sendiumboð, sum umboðar partabrøv eftir stk. 2, hevur eina atkvøðu fyri hvørt partabræv, tó í mesta lagi 5,0 prosent av samlaðu partabrøvunum.

Atkvøðuavmarking upp á 5,0 prosent er tó ikki galdandi fyri eitt holdingfelag, stovnað sbrt. § 4, stk. 1, treytað av at tað í holdingfelagnum eru galdandi samsvarandi atkvøðuavmarkingar.

**Stk. 6** Aðalfundurin tekur avgerðir sínar við vanligum atkvøðumeiriluta, uttan so at annað er ásett aðrastaðni í viðtøkunum ella í lóggávu.

**Stk. 7** Til avgerð um broyting í viðtøkunum, samanlegging við annan peningastovn, ella avtøku av felagnum, krevst, at í minsta lagi 2/3 av samlaða partapeninginum eru umboðaðir og at í minsta lagi 2/3 av atkvøðunum eru fyri, umboðandi minst 2/3 av teimum á aðalfundinum við atkvøðurætti umboðaðu partabrøv.

**Stk. 8** Sendiumboð kann greiða atkvøðu við fulltrú til annað umboð. Sendiumboð, vald sbrt. § 6 stk. 6, kunnu ikki atkvøða við fulltrú fyri onnur umboð, vald eftir somu grein.

Fulltrúin, ið skal vera skrivlig og dagfest, skal fyrivísast á aðalfundinum. Ongin kann atkvøða við fulltrú frá fleiri enn einum. Fulltrú hevur bert gildi á fyrstkomandi aðalfundi, eftir at hon er veitt.

## Nevndin

**§ 15** Í nevndini eru 6 limir valdir av aðalfundinum. Afturat hesum koma teir limir, ið lóggávan annars ásetir.

**Stk. 2** Teir av aðalfundinum valdu nevndarlimirnir verða valdir fyri 3 ár í senn. Hvørt ár fara frá tveir limir samsvarandi teirri raðskipan, ið aðalfundurin hevur samtykt. Limur, ið fer frá, kann veljast aftur.

Nevndarlimir fara frá fyri aldur í seinasta lagi 4 mánaðir eftir, at tað ár, sum teir eru fyltir 70 ár, er umliðið.

**Stk. 3** Fer nevndarlimur, sum er valdur á aðalfundi, frá í valskeiðnum, kann nevndin velja annan lim í hansara stað at sita til fyrstkomandi aðalfund, har valdur verður nýggjur limur fyri tað, sum eftir er av valskeiðnum.

**Stk. 4** Eingin, sum hevur álitisstarv ella starv í øðrum peningastovni, dóttur- ella móðurfelagi hjá sama, ella í øðrum feløgum, ið reka virksemi, sum er í kapping við felagið, kann vera limur í nevndini. Sama er galdandi fyri persónar, sum ikki hava ræði á búgvi sínum.
**Stk. 5** Eru viðurskifti galdandi fyri ein av aðalfundinum valdan nevndarlim, sum nevndin metir gera hann óskikkaðan til at vera í nevndini, kann nevndin, tá minst 2/3 av nevndarlimunum atkvøða fyri hesum, avgera at vísa nevndarliminum burtur. Slík avgerð skal innan 3 mánaðir leggjast fyri aðalfund til góðkenningar.

**§ 16** Nevndin skipar seg sjálv, á fyrsta nevndarfundi eftir aðalfundin, við formanni og næstformanni.

**Stk. 2** Nevndin hevur leiðslu felagsins um hendi og skal síggja til, at virksemi felagsins er forsvarliga skipað.

**Stk. 3** Nevndin ásetir í eini starvsskipan gjøllari reglur um útinnan av sínum starvi.

**Stk. 4** Nevndin er viðtøkufør, tá ið meirilutin av nevndarlimunum er á fundi. Avgerðir verða tiknar við vanligum meiriluta. Stendur á jøvnum, er atkvøða formansins, og um hann ikki er á fundi, atkvøða næstformansins, avgerandi.

**Stk. 5** Um tað, sum fer fram á fundi í nevndini, verður førd gerðabók, ið verður undirskrivað av øllum hjástøddum limum. Hartil verður grannskoðaragerðabókin framløgd á hvørjum nevndarfundi, og hvør tilførsla verður undirskrivað av øllum nevndarlimum.

## Stjórn

**§ 17** Til at taka sær av dagligu leiðsluni í felagnum setir nevndin eina stjórn, mannað við einum ella fleiri limum. Eru fleiri limir, verður ein tilnevndur forstjóri.

**Stk. 2** Setanartreytir fyri stjórnina verða ásettar í sáttmála millum stjórnina og nevndina.

**Stk. 3** Stjórnin stýrir dagliga virki felagsins samsvarandi viðtøkunum og starvsskipan, ið nevndin ásetur, og umboðar á tí starvsøki, ið henni er tillutað, felagið í rættarmálum við triðjamann. Stjórnin setir og loysir úr starvi starvsfólk og ásetir samsýning teirra og aðrar starvstreytir.

**Stk. 4** Nevndin ásetir í eini instruks, í hvønn mun tað krevst, at nevndin luttekur fyri at játta lán, kredittir, garantiir og møguliga aðrar skyldur.

**Stk. 5** Stjórnin luttekur á nevndarfundum, uttan so at

til viðgerðar eru mál, ið viðvíkja tí einstaka stjóranum ella stjórnini sum heild. Stjórnin hevur talu-, men ikki atkvøðurætt á nevndarfundi og hevur rætt at fáa síni sjónarmið førd í gerðabókina.

**Stk. 6** Gjørdar eru yvirskipaðar leiðreglur fyri incitamentssamsýning fyri nevnd og stjórn bankans. Hesar leiðreglur eru samtyktar á aðalfundi bankans og almannakunngjørdar á heimasíðu bankans.

## Tekningarreglur

**§ 18** Stjórnar- og nevndarlimir tekna felagið úteftir.

**Stk. 2** Felagið verður teknað av tveimum stjórum í felag, av einum stjóra saman við nevndarlimi, ella av formanninum ella næstformanninum í nevndini saman við einum øðrum nevndarlimi.

**Stk. 3** Nevndin kann veita felagsprokura og serfulltrú.

## Grannskoðan

**§ 19** Roknskapurin verður grannskoðaður av eini av aðalfundinum valdari grannskoðan.

**Stk. 2** Samsýningin til grannskoðararnar verður ásett sambært avtalu millum grannskoðararnar og nevndina.

## Roknskaparár

**§ 20** Roknskaparárið er álmanakkaárið.

## Skiftisreglur

**§ 21** § 15, stk. 1 og stk. 2 koma í gildi á komandi regluliga ársaðalfundi. Inntil tá eru ásetingarnar í stk. 2 og 3 í hesi grein galdandi.

**Stk. 2** Í nevndini eru 7 limir valdir av aðalfundinum. Afturat hesum koma teir limir, ið lóggávan annars ásetir.

**Stk. 3** Teir av aðalfundinum valdu nevndarlimirnir verða valdir fyri 4 ár í senn. Hvørt ár fara frá tveir limir samsvarandi teirri raðskipan, ið aðalfundurin hevur samtykt. Limur, ið fer frá, kann veljast aftur.

Nevndarlimir fara frá fyri aldur í seinasta lagi 4 mánaðir eftir, at tað ár, sum teir eru fyltir 70 ár, er umliðið.

**Stk. 4** Henda grein dettur burtur og verður strikað á komandi regluliga ársaðalfundi.

Tórshavn, tann xx. xxxx 2009

## Nevndin fyri Eik Banka P/F

Frithleif Olsen, formaður

Odd A. Bjellvåg, næstformaður

Gert Langgaard

Finnbogi Niclasen

Marian Jacobsen

Mathea Hilduberg

Fía Selma Nielsen

Tórmund A. Joensen

Rakul Dam

Rólant Vidtfeldt

Petur D. W. Hammer

Eik

**Eik Banki P/F**
Yviri við Strond 2
Postboks 34
110 Tórshavn

Tel : 348 000
Fax : 348 800

eik@eik.fo
www.eik.fo